# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fótbóltsføroyar fáa fótbóltsportal

**Slóðin er einføld, og visjónin er greið: F.FO verður staðið, har fótbóltsáhugaði føroyingurin fær síni dagligu fótbóltstíðindi, siga stigtakararnir**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stigtakararnir til síðuna ynskja at savna øll føroysk fótbóltstíðindi á einum og sama stað – á f.fo. Har verður dentur lagdur á góðsku, innihald, og óheftan tíðindaflutning umvegis alnetið.

F-portalurin fer at hava 10-15 fólk, sum regluliga fara at skriva inn á síðuna. Talan verður um upptaktir, dystarfrásagnir, tíðindi, hugleiðingar, kjak, myndir og video.

Brúkaraskráseting verður møgulig á f.fo, sum gevur einstaka brúkaranum høvi til aktivt at luttaka í kjakinum um føroyskan fótbólt. Hartil kann einstaki brúkarin "uploada" myndir, video og ljóðfílur inn á síðuna, sum sostatt leggur upp til víttfevnandi brúkarainteraktión.

F.fo fer fyrst og fremst at borðreiða við tíðindum úr Formuladeildini, men aðrar deildir og landsliðið fáa eisini pláss á f.fo.

Sambært stigtakarunum er endamálið við f.fo at ríka um føroyska fótbóltssamfelagið og samlaðu fótbóltsupplivingina, og fara tey at leggja seg eftir at verða Føroya fremsti fótbóltstíðindaportalur.




*F.fo ætlar sær at gera upptaktir, dystarfrásagnir og tíðindi, umframt eitt kjakforum, myndir, ljóð og video*

# Tvey umfør – tvey Formulalið

**Um páskirnar eru tvey umfør í Formuladeildini spæld – 2. umfar skírisdag og 3. umfar 2. páskadag. Fyri hvørt umfar, sum verður spælt í Formuladeildini mannar Ítróttarsosialurin Formulaliðið við leikarum, sum hava staðið seg væl júst tað umfarið. Hetta merkir, at nú skulu tvey Formulalið mannast og úrslitið síggja tit niðanfyri á hesi síðuni.**

## 2. umfar




## 3. umfar

